

*Tær lógir, útstykkingar, byggisamtyktir og reglugerðir, ið vóru handaðar mær, tá ið eg byrjaði í starvinum, vístu ongar forðingar fyri at byggja í Vallalíð. Eg fekk eisini greitt at vita, at allar gamlar samtyktir vórðu settar úr gildi, tá ið nýggja byggisamtyktin kom í 1996, tó so at okkurt av tí gamla varð nýtt sum vegleiðing í málsviðgerðunum, sigur Ove Mortensen um gølubyggingina í Vallalíð*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Ætlaði at verða við til at menna Havnina

**Ove Mortensen var býararkitekur í Havn í sløk tvey ár. Men hann varnaðist skjótt, at býararkitekturin var ikki annað enn ein vanligur skrivstovumaður, sum ongar heimildir fekk og so misti hann hugin fyri starvinum**

BÝARÆTLANIR
*Áki Bertholdsen*

Tá ið Ove Mortensen søkti starvið sum býararkitektur í Havn, hevði hann vónir um at vera við til at menna høvuðstað okkara. So tað var við góðum treysti, at hann tók við starvinum í januar í 2000.

Men hann bleiv ikki drúgvur í starvinum, tí longu í november árið eftir, gavst hann, eftir at hava sitið í starvinum í minni enn tvey ár.

Vit hava spurt Ova Mortensen, hví hann søkti starvið sum býararkitektur og hví hann hann gavst so skjótt aftur.

Hann sigur, at hann hevur hoyrt nógvar gitingar um, hví hann gavst so skjótt.

– Veruleikin er, at tá ið eg søkti starvið, hevði eg vón um, at eg, kundi vera við til at menna býin, saman við umsitingini hjá kommununi.

Í hesum sambandi hevði eg eisini vónir um at kunna vera við til at tryggja, at arkitektoniski og umhvørvisligi parturin fekk størri leiklut í kommununi enn vit vóru von við, serstakliga tá ið hugsað var um ta menning, sum stóð fyri framman.

– Eg metti, at góður møguleiki varð fyri at gera gott arbeiði í samstarvi við umsitingina til frama fyri tey, sum búga í høvuðsstaðnum. Eg metti, at tað fór at bera til at arbeiða við ymiskum ætlanum, gera uppskot at leggja fyri politikarirnar o.s.fr.

Men Ove Mortensen sigur, at tað varð so skjótt, at hann bleiv klókari.

– Aftaná at hava arbeitt hjá kommununi í nakrar mánaðar sást, at starvið sum býararkitektur ikki rakk til annað enn eitt vanligt skrivstovustarv. Og harafturat eitt skrivstovustarv, har sera nógv var at gera.

– Tað sást eisini skjótt at býararkitekturin so at siga ikki hevði heimild til nakað sum helst. Tað sum býararkitekturin fyrr hevði staðið fyri, var nú undir leiðslu av stjórunum.

Sostatt refereraði býararkitekturin beinleiðis til hesar stjórarnar. Hann mátti ikki sjálvur taka avgerðir, tí tað hoyrdi undir stjórarnar. Tó kundi hann av og á mæla til ella frá í ymiskum málum.

Fyrrverandi býararkitekturin sigur, at hetta er ein avleiðing av, at bygnaðurin hjá kommununi varð broyttur síðst í nítiárunum.

Í tí sambandinum vórðu ymiskir stjórar settir í starv, og býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mistu tign í umsitingini.

Ove Mortensen gitar eisini, at hesar bygnaðarbroytingarnar vóru ein orsøkin til, at ein skilagóður maður, sum áður sat sum leiðari hjá kommununi, segði úr starvi.

Hann vil ikki nevna nøvn, men lítið er at ivast í, at hann sipar til Gunnar Hoydal, sum var býararkitektur undan Ova Mortensen.

## Ikki stundir at fylgja við

Ove Mortensen sigur, at sum støðan var nú, hevði býararkitekturin ikki stundir til stórt annað enn at avgreiða mál á skrivstovustøði.

Hetta førdi við sær at so gott sum einki uppskot kom frá umsitingini til politikararnar. Tíð var ikki til at taka sær av tí, ein býararkitektur átti at gjørt, og umsitingin kundi heldur ikki fylgja við í tí nógva arbeiðinum.

– Og ótolnir, sum politikarar ofta eru, fóru teir so av og á sjálvir at seta ymisk byggi- og planleggingarmál á dagsskrá.

Hetta var ein tíð, tá ið nógv ferð aftur var komin á samfelagshjólini. Og við teirri manning, sum umsitingin hevði, fekk hon yvirhøvur ikki fylgt við. Men hetta skiltu politikarinir ikki.

Ove Mortensen sigur, at hann tó hevur hoyrt, at teir seinni hava sett tiltøk í verk fyri at bøta um hetta. Hann sigur, at umsitingin, ið mest sum øll var nýggj, var ikki fyrireikað til tað stóru kollveltingina, sum ikki fór at merkjast av álvara, fyrr enn í 1999.

– Ein í umsitingini greiddi mær frá, at tað eina árið mitt í nítiárunum, fekk býráðið bara eina umsókn um byggiloyvi. Og so sótu teir, fýra mans, við eitt borð og hugdu eftir hesi góðu umsókn og vistu ikki rættiliga, hvat teir skuldu gera við hana.

– Men tak støðuna nú aftur ímóti. Ongar kommunalar byggi- og býarætlanar vóru gjørdar í eini 10-12 ár, kanska meiri, men so við ein brest skuldi alt ígongd í senn, sjálvt um peningur ikki var til allar hesar ætlaninar.

Kollafjørður gjørdist eisini ein partur av kommununi, og økti hetta eisini um arbeiðsbyrðuna hjá umsitingini.

Ove Mortensen nevnir at síðst í nítiárunum fekk byggi- og býarskipanardeildin hjá býráðnum eini 400-600 mál inn um árið at avgreiða. Til samanberingar kann nevnast, at í 2000 var hetta tal økt til umleið 1000 mál og í 2001 fekk hann eini 1200 mál inn á borðið.

Harafturat kann nevnast, at ímillum 50 - 90 % av dagliga postinum til alla kommununa endaði á borðinum hjá honum. Hinvegin hevði hann ongan skrivara at hjálpa sær, soleiðis sum aðrir leiðarar hjá kommununi høvdu, so arbeiðsdagarnir sum skrivstovumaður vóru langir.

Hann leggur afturat, at harafturat var hann eisini skrivari í byggi- og býarskipanarnevndini og tað var ikki minst umfatandi. Umframt aðrar fundir, høvdu vit yvir 30 fundir í níggju mánaðir í 2000, við ímillum 15-56 málum á dagsskrá hvørja ferð.

Hann heldur, at í 2001 mundi talið á undum vera áleið tað sama.

Tað tók ofta 1-2 vikur at fyrireika slíkar fundir. Fyrrverandi býararkitekturin heldur, at fólk átti at verðið sett burturav til slíkt fyrireikingararbeiðið, so kundi býararkitekturin lýst málini, sum vóru á dagsskrá og gjørt tilmæli og annars verið við á nevndarfundunum.

Hann sigur, at alt hetta, sum hann frammanfyri hevur nevnt, er sjálvandi eitt arbeiði, sum skal gerast.

– Men, álvara tos, nógv av hesum kundi ein skrivstovuleiðari tikið sær av, og so skuldi býararkitekturin fingið høvi til at gjørt tað, sum býararkitektar gera í londunum rundanum okkum.

Ætlaði at fáa langtíðarætlan Ove Mortensen sigur, at eitt mál, sum hann frá fyrsta degi ætlaði at seta í verk, var at gera eina langtíðarætlan fyri útbyggingar, og vøksturin sum heild, í allari kommununi.

Eftir mínum tykki bleiv býurin lutaður sundur í nakrar størri býarpartar, har tað var alt ov langt ímillum miðdeplarnar í hesum býarpørtunum. Miðbýurin er bygdur fastur, so tað ber at kalla ikki til at byggja hann meiri út. Hann sigur, at hetta er nakað tað sama, sum er hent í Reykjavík. Hesum kundi verðið lagt upp fyri við eini skilagóðari langtíðarætlan, sum regluliga varð dagførd.

Hann sigur, at hóast stundir ikki vóru til tað, fekk hann tíðliga í 2001 undirtøku frá tekniska stjóranum til at fara í holt við at lýsa eina heildarætlan til politikararnar fyri kommununa.

– Politikararnir tóku so við og við undir við hesi ætlanini, og fyribils navnið hon fekk var “20 ára heildarætlan fyri Tórshavnar kommunu”.

Fólk í umsitingini varð sett burturav til at arbeiða við ætlanini, og til at dagføra hana og samstarvað varð við ráðgevarar uttan fyri umsitingina.

Ove Mortensen sigur, at hann hevur hoyrt, at hetta arbeiði nú er liðugt og hann er spentur at vita, hvat er komið burturúr.

Men hann sigur eisini, at sum tíðin gekk, bleiv tað meira og meira greitt fyri honum, at hann arbeiddi so at siga bara sum vanligur skrivstovumaður, og ikki sum arkitektur.

Hetta var ikki tað, hann hevði ímynda sær við starvinum og tað var heldur ikki hesa fatanina, hann hevði fingið av starvinum eftir setanarsamrøðuna.

– Politikarar hava helst misskilt endamálið við býararkitektstarvinum, og tískil eiga teir at broyta starvslýsingina munandi, tá ið søkt verður eftir nýggjum býararkitekti, leggur hann afturat. Tí vildi eg ikki halda fram í starvinum við tí innihaldi, sum tað nú hevði.

Í februar 2001 sendi hann stjórunum skriv, har hann setti nøkur krøv fram um broytingar sum hann vildi hava skuldi gerast í starvsviðurskiftunum hjá býararkitektinum. Eisini gjørdi hann okkurt uppskot um ymiskar bygnaðarbroytingar á deildini. Nakað av hesum varð ikki gjørt, fyrrenn hann varð farin úr starvi. Samstundis boðaði hann frá, at vórðu krøvini ikki gingin á møti, og var ongin vilji til at tosa um at broyta bygnaðin, fór hann úr starvi.

– Nøkur av hesum krøvum og uppskotum komu so við og við uppá pláss. Tó kom okkurt ikki uppá pláss, eitt nú kravið um at broyta uppsagnartíðina hjá býararkitektinum so at hon var tann sama, sum hjá stjórunum, men hesum vildu stjórarnir ikki taka undir við.

Ove Mortensen sigur annars, at hetta var eitt av høvuðskrøvunum hjá honum, skuldi hann halda fram í starvinum.

– Býararkitekturin kemur av og á í tað støðu, at ávísur ágangur er á hann nógva staðni frá. Og okkurt skal skal hann hava til at standa ímóti við, tá ið ágangurin er størstur. Tá ið eg gavst, var uppsagnartíðin hjá mær ein mánaður. Hjá stjórunum er uppsagnartíðin tvey ár.

– Eitt annað varð, at býararkitekturin, eins og býarverkfrøðingurin skuldi flytast upp á leiðslustøði tætt við stjórarnar og vera við á stjórnarfundum saman við teimum og borgarstjóranum. Hetta var fyri at kunna fylgja við, og tryggja, at avgerðir í sambandi við økið hjá býararkitektinum ikki vórðu tiknar av fólki, ið ikki høvdu nóg góða vitan um hesi viðurskiftir.

Ove Mortensen sigur, at býararkitekturin hevði heldur ikki loyvi til at úttala seg, ella gera viðmerkingar alment um viðurskifti í kommununi, uttan at hann fyrst hevði fingið loyvi til tað frá tekniska stjóranum, síðani frá kommunustjóranum og til síðst frá borgarstjóranum.

Býararkitekturin eigur eisini at vera við til at umboða kommununi í ymsum høpi, og til mynda kommununa uttanfyri umsitingina.

– Men sum tað sæst, eru tað stjórarnir, ið gera hetta. Fyrrverandi býararktitekturin sigur, at tað endaði við at hann í oktober 2001, kunnaði leiðsluna um at hann fór úr starvi beinanvegin tí viðurskifti hansara fingust ikki í rættlag.

– Tó komu vit ásamt um, at skilabest var um eg hjálpti til við at fáa ein nýggjan býararkitekt uppá pláss, og at eg sostatt kundi eg halda fram í starvinum til í februar ella mars í 2002.

Men síðst í 2001 frætti eg í býnum, at menn í grótthúsinum høvdu lovað arkitekti og øðrum stigtakarum økið á Skálatrøð til stóra ætlan, sum seinri bleiv kunngjørd í fjølmiðlunum.

Hetta varð gjørt uttan yvirhøvður at hava kunnað býararktitektin um tað frammanundan og enn minni var tað gjørt uttan at býararkitekturin varð tikin við uppá ráð.

Ove Mortensen sigur, at hetta bleiv ov mikið fyri seg, og tískil fór hann úr starvinum eina viku seinri. Eru tað so nøkur mál, sum tú ert serliga fegin um at hava framt og nøkur mál, sum tú ert serliga harmur um?

– Mest fegin eri eg um, at eg fekk sett skjøtil á arbeiði at gera eina 20 ára heildarætlanina fyri kommununa. Hinvegin er tað nógv, sum hann iðrar seg um, sigur hann. Men hann leggur afturat, at hann hevur tagnarskyldu.

– Men í øllum førum iðrar tað meg at tað ikki eydnaðist at fáa viðurskiftini hjá býararkitektinum betri.

– Ein maður í slíkum starvi, sum ikki hevur nakrar heimildir, kann ikki brúkast til nakað sum helst. Vónandi duga politikarir og stjórar at síggja hetta, og fáa skil á hesum, og áðrenn starvið verður lýst aftur, sigur Ove Mortensen.

Nú tosaði tú um trýst á býararkitektin. Var tað nakrantíð so, at politikarar royndu at hótta teg, ella at kroysta teg.

– Tað havi eg onga viðmerking til, svarar Ove Mortensen stutt.

## Gjørdi onki skeivt í Vallalíð

Tað ber illa til at tosa við fyrrverandi býararkitektin uttan at nema við nógv umrøddu byggingina í Vallalíð, serliga nú borgarstjórin alment hevur lasta umsitingina fyri mistakið sum er gjørt.

Ove Mortensen vísir aftur til, at hann hevður tagnarskyldu, hóast hann er farin úr starvi, so tað er avmarkað, hvat hann kann upplýsa.

– Eg hevði eisini væntað at borgarstjórin hevði tagnarskyldu, men tað hevur hann kanska ikki?

– Í hvussu so er kann eg siga, at maður í slíkum starvi sum borgarstjórin, má duga sær hógv, og ikki lata seg kasta runt av fjølmiðlunum. Borgarin er ikki býttur, og hann missur virðingina fyri fólki, ið ikki duga sær hógv.

Men hann heldur ikki at umsitingin hevur gjørt nakað mistak í málinum um Vallalíð, tað tíðina, hann sat í starvi hjá kommununi. Og hann dugur ikki at siga, um hon hevur gjørt tað nú.

– Eisini kann eg leggja afturat, at eg ikki visti av, at kommunan átti stykkið, fyrr enn áheitan kom um hetta økið bæði ovaliga- og niðarliga. Eg fekk eitt nýtt kort yvir ognir hjá kommununi, og eina markering av teimum økjum, ið byggjast kundi á. Fólk í umsitingini kannaðu hetta gjølla, og mæltu til trý øki at byggja á.

– Tær lógir, útstykkingar, byggisamtyktir og reglugerðir, ið vóru handaðar mær, tá ið eg byrjaði í starvinum, vístu ongar forðingar fyri at byggja í Vallalíð. Eisini fekk eg greitt at vita, at allar gamlar samtyktir vórðu settar úr gildi, tá ið nýggja byggisamtyktin kom í 1996, tó so at okkurt av tí gamla varð nýtt sum vegleiðing í málsviðgerðunum.

– Í býnum havi eg hoyrt, at leiðslan í kommununi sigur, at eg skuldi havt sitið í eini bygginevnd fyri stovnin við Vallalíð. Tað er einki hald í hesum, sigur Ove Mortensen og hann sigur, at hann veit ikki, hvaðani hetta kemur. Hann sigur, at hann sat í einum arbeiðsbólki við fakfólkum á eldraøkinum, ið skuldi fáa til vega eina skrá at halda seg til, tá ið tað kom hartil, at ellis- og røktarheim skuldi byggjast í kommununi.

– Endamálið varð ikki at gera eina skrá til eitt ávíst øki, og kundi ein stovnur av hesum slagi eins gott ligið í Kollafirði, og ikki í Vallalíð. Hinvegin var eg farin úr starvi, áðrenn nøkur bygginevnd var sett. Hann sigur, at annars setti hann fólk til at kanna viðurskiftini í sambandi við Vallalíð, eitt nú ognarviðurskiftini fyri vegin inn til økið.

Vegurin er nevniliga privatur og fólk í økinum skuldu í hesum sambandi kunnast um ætlanina, at byggja við Vallalíð. Hendan kanningin varð sett í gongd nakað fyri áðrenn eg gavst, men hvussu tað endaði, veit hann ikki.

– Men er tað so, at fyrsta liðið í umsitingini hevur gjørt okkurt skeivt, hvør man so í øðrum lagi hava givið byggiloyvi til eldrasambýlið við Vallalíð? spyr hann.

– Áðrenn slíkt loyvi verður givið, eigur alt at vera kannað. Hetta er eisini nakað, sum er framt aftaná, at eg eri farin.

– Eitt annað, sum undrar meg í hesum máli, og fleiri við mær, er, hví ongin hevur tosað við meg um málið. Hann sigur, at hann kann bert gita hví so er.

– Og tá ið alt hetta er sagt, kann eg nevna, at eg ikki kann siga meg undan at hava verið við í fyrstuni. Men hvat er hent síðani eg fór, veit eg ikki, og eg taki ikki skyldina á meg fyri borgarstjóran, tað má hann duga at skilja, sigur Ove Mortensen.

Hann sigur, at hann hevur ikki fleiri viðmerkingar til Vallalíð so tað nyttar onki at spyrja hann, hvør hann heldur tað so er, sum hevur gjørt eitt mistak í sambandi við byggingina í Vallalíð. Tú nevndi í áðni, at politikarar ofta vóru ótolnir. Hvussu var samstarvið annars við politikararnar?

– Politikarir eru nú einaferð politikarar. Sum heild eru teir skilagóðir, men viðhvørt eru teir dekan og knappir og hetta kann til tíðir føra til rok og mistøk. Gongur teimum ímótir, fær umsiting sum oftast skoluna. Hetta er tó nakað, ein skjótt venur seg við og er hetta ein partur av politiska spælinum.

Hann leggur afturat, at honum hevur dámt væl at samstarva við politikarar, sjálvt um nógvar ósemjur hava verið.

Men hevur tú nakra hóming av, hvussu tað ber til, at tað eru hend so nógv mistøk í kommununi seinastu tíðina?

– Umsitingin hjá kommununi hevur úr at gera, og manningin er kanska ikki altíð tann rætta at viðgera tey ymisku málini. Men fólk gera sítt besta, og tey gera harafturat eitt sera stórt arbeiði, men tað er ikki altíð, at borgarin í kommununi dugir at seta seg inn í teirra viðurskifti. Tað eru nógv stórmál, ið hesi fólkini umsita, og hetta er ikki so lítið.

– Men hinvegin haldi eg eisini, at tað er sera løgið, at fólk, ið hava sitið í umsitingini hjá kommununi í nógv ár, og somuleiðis politikarar, ið hava sitið í býráðnum og í nevndum í hálvar og heilar mansaldrar, siga seg ikki kenna nakað til galdandi byggisamtyktir, reglugerðir og útstykkingar o.s.fr. Tað er ov illa frágingið, at ikki alt tilfar og øll skjøl liggja til taks, har tað hoyrir heima.

Ove Mortensen heldur, at Býráðið eigur at fáa fatur á fyrsta býararkitektinum og gomlum politikarum við, og í samstarvi við teir at syrgja fyri at allar samtyktir, reglugerðir og útstykkingar o.s.fr., fáast upp úr kjallaragoymslunum og út undan væðingini í Gróthúsinum og upp á hillarnar hjá umsitingini og málsviðgerðunum, har tær hoyra heima, sigur Ove Mortensen.

Hann sigur, at tað, sum Tórshavn, nú hevur brúk fyri, er einum sjónligum býararkitekti, sum hevur heimildir til at skera ígjøgnum og tað vónar hann, at býráðið hugsar seg um, áðrenn teir søkja eftir nýggjum býararkitekti.



*Ove Mortensen sigur, at hann metti, at tað fór at bera til at arbeiða við ymiskum ætlanum, gera uppskot at leggja fyri politikarirnar o.s.fr. Men tað varð skjótt, at hann bleiv klókari.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*